# Býráðið - fundur 11/2020, hildin Í Støð 5 í Fuglafirði

**Dagfesting:** 17.12.2020 kl. 19:00
**Málnr.:** 20/00082-16

Nevndarlimir: Sonni á Horni, Eivin Breiðaskarð, Árant Berjastein, Edva Jacobsen, Eyðun á Lakjuni, Kristian Petersen, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen, Sigurð Simonsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| Málsyvirlit | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 16/20 | 20/00514-20 | Tilmæli frá setanarbólkinum í sambandi við starvið sum tilbúgvingarleiðari hjá Fuglafjarðar kommunu |
| 17/20 | 20/00596-7 | Uppskot til dagføring av reglugerð fyri hátíðarhald av merkisdøgum hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu |
| 18/20 | 20/00612-1 | Uppskot um ásetan av býráðsfundum í 2021 |
| 19/20 | 20/00536-7 | Kunning um møguligt alment/privat samstarv viðvíkjandi víðkan av bryggjuni, oljukaiini, 80 metrar suðureftir |
| 20/20 | 20/00395-3 | Havsbrún - Umsókn frá SMJ um byggilovyi til nýggja lýsitangaskipan |
| 21/20 | 20/00162-7 | Støðulýsing av arbeiðinum við Fuglafjarðar søgu grunda á fund við Steffen Stuman Hansen |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**16/20**
**20/00514-20 Tilmæli frá setanarbólkinum í sambandi við starvið sum tilbúgvingarleiðari hjá Fuglafjarðar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.12.2020 | 19/20 |
| 2 Býráðið | 17.12.2020 | 16/20 |

3

Hetta mál varð viðgjørt fyri afturlatnum hurðum samsvarandi § 26, stk. 1 í kommunustýrislógini og § 1, 3. petti í fundarskipanini hjá Fuglafjarðar býráð.

**17/20**
**20/00596-7 Uppskot til dagføring av reglugerð fyri hátíðarhald av merkisdøgum hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.12.2020 | 20/20 |
| 2 Býráðið | 17.12.2020 | 17/20 |



**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Galdandi reglugerð frá 2016 viðvíkjandi hátíðarhaldi av merkisdøgum hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu er ikki praktisera í verki, hóast endamálið við eini tílíkari reglugerð er gott og snýr seg um starvsfólkatrivnað og -menning. Reglugerðin leggur eisini upp til, at øll starvsfólk – óansæð hvørja funktión starvsfólki hevur í kommununi – kann heiðrast, antin aftaná eitt ávíst áramál í starvi ella, tá viðkomandi fer úr starvi.<br><br>Upphæddirnar, ið latnar verða sambært reglugerðini, eru í trá við leiðreglur hjá TAKS viðvíkjandi skattafríum gávum frá arbeiðsgevara til starvsfólk. |
| Bakgrund | Starvsfólkapolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu viðvíkjandi virðing, trivnaði og menning. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Starvsfólkapolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu** |

| | |
|---|---|
| | **Skattalógin**<br>**Kommunustýrislógin**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Skjal við uppskoti til dagføring av reglugerð fyri hátíðarhald av merkisdøgum hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ikki av týdningi | Ikki av týdningi |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nakað |
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til, at fíggjarnevndin tekur undir við at mæla býráðnum til góðkenna uppskoti til dagføring av nevndu reglugerð viðvíkjandi heiðran av starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu á teirra merkisdøgum. | | |
| Dagf | 7/12-2020 | | |

**Fíggjarnevndin 10. december 2020**

Borgarstjórin var noyddur at fara av fundinum umleið kl. 16:55. Fíggjarnevndin samtykti einmælt, at mæla býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til reglugerð viðvíkjandi at hátíðarhalda merkisdagar hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu. 5

**Býráðið 17. desember 2020:**

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna fyriliggjandi uppskot til reglugerð viðvíkjandi at hátíðarhalda merkisdagar hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu.

## 18/20
## 20/00612-1 Uppskot um ásetan av býráðsfundum í 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 17.12.2020 | 18/20 |



**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing | Borgarstjóri, Sonni á Horni, hevur sent uppskot um ásetan av fundardøgum hjá býráðnum í 2021 – hósdagar kl. 19:00. | | |
| Bakgrund | § 13, stk. 1, 3. pkt. Í kommunustýrislógini | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Brævv frá borgarstjóra, Sonna á Horni, dagfest 11. desember 2020, við uppskoti um fundardagar hjá býráðnum í 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Kommunustjórin mælir til, at býráðið tekur undir við uppskotinum hjá borgarstjóranum um fundardagar hjá býráðnum í 2021 |
| Dagf | 11/12-2020 |

**Býráðið 17. december 2020:**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við uppskotinum hjá borgarstjóranum um ásetan av fundardøgum hjá Fuglafjarðar býráð fyri 2021.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**19/20**

**20/00536-7 Kunning um møguligt alment/privat samstarv viðvíkjandi víðkan av bryggjuni, oljukaiini, 80 metrar suðureftir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 16.11.2020 | 20/20 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 14.12.2020 | 22/20 |
| 3 Býráðið | 17.12.2020 | 19/20 |

**Býráðið 17. desember 2020:**
Borgarstjórin kunnaði um, at málið er framvegis í viðgerð, og verður tikið fram aftur til viðgerðar á einum seinni býráðsfundi.

## 20/20
## 20/00395-3 Havsbrún - Umsókn frá SMJ um byggilovyi til nýggja lýsitangaskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 14.12.2020 | 23/20 |
| 2 Býráðið | 17.12.2020 | 20/20 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. | | |
| Stutt lýsing | Fuglafjarðar kommuna hevur fingið umsókn frá ráðgevanum SMJ vegna Havsbrún um byggiloyvi til tøknihús í tangagarðinum norðuri á Enninum.<br>Umsitingin hevur viðgjørt umsóknina saman við innsendum tekningum. | | |
| Bakgrund | Havsbrún hevur tørv á nýggari lýsitangaskipan. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin<br>BK 17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 20/00395-1 Umsókn um byggiloyvi saman við tekningum til tøknihús í tangagarðinum norðuri á Enninum | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til at geva byggiloyvi sambært umsókn um byggiloyvi saman við tekningum og frágreiðingum, og at húsið verður staðsett í samráð við teknisku deild. | | |
| Dagf | 7. desember 2020. | | |

**Vinnu- og havnanevndin 14. desember 2020:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til endaliga støðutakan.

**Býráðið 17. desember 2020:**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum hjá Vinnu- og havnanevndini, og geva Havsbrún byggiloyvi til nýggja lýsitangaskipan.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**21/20**
**20/00162-7 Støðulýsing av arbeiðinum við Fuglafjarðar søgu grunda á fund við Steffen Stuman Hansen**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2020 | 4/20 |
| 2 Býráðið | 17.12.2020 | 21/20 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Mentamálanevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Fyrst í hesi øldini var avgerð tikin um at skriva Fuglafjarðar Søgu. Býráðið samtykti at seta á stovn ein søgubólk við Steffen Stuman Hansen sum redaktøri. Í 2012 verður SSH settur á lønarlistan hjá FK og skal hann saman við søgubólkinum skriva Fuglafjarðar Søgu.<br>Ongin avmarkandi arbeiðssetningur verður gjørdur fyri arbeiðið og við árunum veksur uppgávan frá 1. bindi til 4. bind, sum bólkur og redaktørur ynskja verða útgivin samstundis.<br><br>Í jan 2016 verður innkallað til fund við bólkin, seinsti fundur áðrenn hetta var í 2014, har traðrirnir verða samlaðir og kvartalsfundir settir á skrá. Lítil framdrift sæst og arbeiðsætlanin verður broytt ferð eftir ferð. Í 2018 verður endalig avgerð tikin um at leggja bind 3 og 4 stilt og seta sjóneykuna á bind 1 og 2. Seint í 2019 kemur aftur stígur í arbeiði. Avbjóðingar eru við arbeiðslagnum og trupult er at savna partarnar. Fyrsta kvartal í 2020 verður roynt at savna bólk og redaktør til fundar, men royndin miseydnast og hevur málið ligið stilt til 24. sept. 2020.<br><br>Á fundi 24. sept. 2020 við SSH, verður avtala gjørd við SSH um at niðurleggja søgubólkin, og fáa redaktørin at skriva seinastu partarnar sum mangla til bind 1 og 2. SSH játtar og metur at hann kann verða liðugur um ársskiftið 20/21. Somuleiðis verður avtalað at arbeiðið verður gjørt uttan løn. Eitt møguligt lønarískoyti kann latast fyri arbeiðið at seta upp bind 1 og 2, sum verður gjørt |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | saman við John Dalsgarð. Hetta stendur opið til samráðingar og talan er í mesta lagi um 3. mdr. Væntandi verða bind 1 og bind 2 latin til prentingar fyrst í 2. kvartali. SSh sendur FK tilboð uppá prentkostnað.<br><br>**Framhald 17. desember 2020**<br>Fundur var við Steffen Stuman Hansen í gjár, har borgarstjórin, formaðurin í mentamálanevndini, mentanarleiðarin og kommunustjórin luttóku. Steffen greiddi frá, at tíðarætlanin, sum varð avtalað í september mánaða í ár, heldur soleiðis at arbeiðið við bindunum 1 og 2 verður liðugt umleið ársskiftið. Síðani kemur prentuppseting v.m, og tíðarætlanin til útgevan av Fuglafjarðar søgu er sett til 31. mars 2021. Tilboðið frá Gramar v/John Dalsgarð viðvíkjandi prentfyrireiking og prenting av bókaverki í tveimum bindum er hækka nakað í mun til tilboðið frá 2017. Tilboðið er lagt við málinum. | | |
| Bakgrund | Málið hevur ligið ov leingi stilt. Lutfalsliga nógvur peningur er brúktur, tí var umráðandi at fáa gongd á aftur málið. Steffen Stuman Hansen játtar at koma á fund við kommunustjóran og skrivarin í nevndini og geva eina støðulýsing av arbeiðinum. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | JA | NEI |
| | Umsitingarligar | JA | NEI |
| Tilmæli | Mælt verður til, at mentamálanevndin tekur undir við tí arbeiðsætlan, sum fyrisitingin saman við SSH hevur sett í verk.( Sí 20/00162-5) Býráðið verður kunnað um at søgubólkurin verður niðurlagdur. Søgubólkurin verður boðin til fundar við fyrisiting og evt mentamálanevnd. Søgubólkurin fær eina kunning og gávur handaðar við tøkk fyri lokið arbeiðið. Ein møguleiki er at geva peningagávur og/ ella list til limirnar í søgubólkinum Mælt verður til at seta uml 150.000 -200.000 kr av til søgubólkin, herí rokna samsýning til SSH fyri uppseting. Hartil verður mælt til, at upphæddin, sum er avsett á fíggjarætlan kommunurnar fyri 2020, verður flutt yvir á fíggjarætlan 2021.Sjálvsagt má upphædd samsvara við tilboð frá John Dalsgarð.<br>Hølisleigan á 800 kr/ mdr skal sigast upp.<br>Bind 3 og 4 kann støða takast til, tá bind 1 og 2 eru givin út. Tá kann málið takast upp av nýggjum. | | |
| Dagf | 02.10. 2020 | | |

12

Mentamálanevndin 06. oktober 2020
Petur Martin, Evald, Jan, Jóna og Frits eru í søgubólkinum. Steinbjørn í Lambanum og Kristin Poulsen hava loyst ítøkjuligar uppgávur. (Kanna samtykt)
Nevndin mælir býráðnum til at niðurleggja søgubólkin. Somuleiðis mælir nevndin til at Heðin Kambsdal málar ein málning til hvønn sær í søgubólkinum við søguligum tema úr gomlu bygdini Fuglafirði. Síðani verður søgubólkurin boðin til ein betri bita í Ribarhúsi saman við býráðnum/mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2020:**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum hjá mentamálanevndini, at formliga finna fígging til liðugtgerð av bind 1 og 2 av Fuglafjarðar søgu, uppseting og prent, og samtíðis formliga niðurleggja søgubólkin, sum fyrst í komandi ári verður bjóðaður inn til eina hugnaløtu saman við mentamálanevndini.

Fundurin lokin kl. 20:50

Gerðabókin lisin og góðkend

Sonni á Horni

Eivin Breiðaskarð

Árant Berjastein

Edva Jacobsen

Eyðun á Lakjuni

Kristian Petersen

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Sigurð Simonsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo